# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur  tann 20. mars 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Pauli T. Petersen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen.
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Eyðun Hansen frá 20. mars 2024, at honum barst frá at møta á fundinum.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð 20. mars 2024 og játtaði at møta.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

*Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, fór av fundinum vegna ógegni og luttók ikki í viðgerðini av mál nr. 266.*

**Mál 266**
Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 106a.
J.nr.: 104002-3-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 12. mars 2024 umsókn um sundurbýti av matr. nr. 106a.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 266**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

*Bjørg á Rógvi, borgarstjóri kom aftur á fundin.*

**Mál 267**
Ferðsluviðurskifti í bygdini
J.nr.: 513002-1-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 12. mars 2024 frágreiðing frá Anju Haldansen, forkvinnu, dagf. 27. februar 2024, um gjøgnumgongd av ymiskum ferðsluviðurskiftum í bygdini saman við umboði fyri løgregluna

Luttakarar til gjøgnumgongdina vóru: Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, Anja Haldansen, forkvinna, Sára Jógvansdóttir og Jákup Durhuus, skrivari.

Semja varð um, at tað er eitt gott hugskot at seta ferðina niður á 40 km/t í allari bygdini.

Ymisk støð har bilverja ella stakit mangla.

- Bilverja Inni á Fitjum ímillum Niðara Veg 20 og Seglhúsið.
- Bilverja við parkeringsplássið ytst á Fjalsvegi.
- Stakit ella líknandi á kantin á Garðavegi oman ímóti Garðavegi 13.

Striking

- Gonguteigur á Fjalsveg innanfyri Fjalsveg 6, har gongubreytin fer frá niðara borði niðan í ovara borð.
- Hávatenn við svingið omanfyri Garðaveg 13 frá brúnni á Rógvuvegi og inneftir.
- Hávatenn við svingið Garðavegur 2.
- Strika parkeringsbásar uttanfyri Útibarnagarðin.
- Av og á skipan í niðara borði uttanfyri Gjáarlon.
- Strika av við omankoyringina til Gjáarlon, so útsýni er betur, tá ein skal niðan á vegin.
- Fult upptrekt strika í ovara borði uttanfyri Gjáarlon, ongin parkering. Vísa til, at starvsfólk mugu parkera teirra bilar á tey parkeringspláss, sum eru nærhendis.

Eina bungu niðri á Bøgøtu, har Toftagøtan kemur oman á vegin.

Til ber at steingja eina brekku nakrar tímar, tá kavi er, so børn kunnu skreiða

Nevndin mælir til at taka frágreiðingina til eftirtektar og at arbeiða áfram sambært hesi.

**Viðv. 267**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 268**
Leigusáttmáli við MEST
J.nr.: 803003-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 14. februar 2024 mál um leigusáttmála við MEST. Nevndin viðmerkti at kommunan er áhugað at leiga økið til mentanarligt endamál, men at drátturin átti at verið boðin út. Nevndin skifti eisini orð um at leiga økið omanfyri bedingina, matr. nr. 112b, til parkeringspláss.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 13. mars 2024 uppskot um leigusáttmála við MEST við viðmerkingunum frá fundinum, sum lýst omanfyri.
Nevndin samtykti einmælt at mæla til at góðkenna leigusáttmálan.

**Viðv. 268**
Sára Jógvansdóttir skeyt upp at bygdarráðið samtykkir uppskotið um leigusáttmálan við MEST, men at arbeiða fyri at fáa undantak til bátar, sum eru heimahoyrandi í Vestmanna.

Uppskotið frá Sáru Jógvansdóttir varð einmælt samtykt.

**Mál 269**
Umsókn um stuðul til Økistónar
J.nr.: 2000002-7-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 13. mars 2024 umsókn um stuðul frá Tónleikasamband Føroya til eina stuðulsskipan til føroysk spælistøð, ið skal tryggja úti við 600 konsertir kring landið árliga. Grundtankin er, at landið rindar helvtina og kommunurnar rinda hina helvtina.

"500.000 krónur eru játtaðar á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2024, samstundis sum Tórshavnar Kommuna hevur givið tilsøgn um, at tey vilja verða við til at játta helvtina av kommunala partinum (tvs 250.000 krónur, sum nú er)".

Nevndin samtykti einmælt at mæla til geva tilsøgn um stuðul við somu upphædd sum Tórshavnar kommuna letur per íbúgva.

**Viðv. 269**
Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, skjeyt upp, at bygdarráðið stuðlar Økistónum við kr. 11.000 treytað av, at verkætlanin verður veruleiki.

Uppskotið frá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

**Mál 270**
Tímatakstur fyri tænastur hjá Vestmanna Havn
J.nr.: 801002-1-2024

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 12. mars 2024 áseting av tímataksti fyri tænastur hjá Vestmanna Havn.
Nevndin mælir til at áseta tímatakstin til kr. 350 umframt mvg, tó altíð í minsta lagi fyri tveir tímar.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá Havnanevndini á fundi 13. mars 2024. Nevndin samtykti einmælt at viðmæla tilmælinum frá Havnanevndini.

**Viðv. 270**
Tilmælið frá Havnanevndini og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 271**
Brúgvagjald til bátar
J.nr.: 801002-2-2024

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 12. mars 2024 mál um brúgvagjald til bátar, sum í dag rinda fast gjald ella ikki rinda.

Nevndin mælir til at áseta brúgvagjald til hesar bátar frá 1. januar 2025 at rokna.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá Havnanevndini á fundi 13. mars 2024. Nevndin samtykti einmælt at viðmæla tilmælinum frá Havnanevndini.

**Viðv. 271**
Tilmælið frá Havnanevndini og Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:50

Sign.:

Bjørg á Røgvi Sára Jógvansdóttir Pauli T. Petersen

Laila Haldansen Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen